HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagur, 16. novembur 2023 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila í Hentze, Kristianna W. Poulsen, Leivur Simonsen, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen

Avboð: Gunvør Balle

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir
Skrivari: Malan á Dul Nielsen

Skrá:

1) Seinasta fundarfrásøgn – er góðkend

2) Leiðslan kunnar

- Átøk eru gjørd í onkrum flokki, har vit síggja, at tað ger mun. Har er gott at vera.
- Skráseting í kervi er broytt, soleiðis at nú skulu allir flokkar skrásetast hvønn tíma. Soleiðis síggja vit betri, nær fráveran hjá næmingunum gerst ov høg. Skúlin hevur gjørt mannagongdir, hvussu vit gera, um næmingur hevur ov høga fráveru.
- Hoyvíkar skúli er næst á skrá at skula endurnýggjast/byggjast. Vit hava fingið at vita at tekningar eru á veg.

3. Felagstiltak við SvL er útsett, men vit hugsa at hava eitt foreldratiltak fyri allan skúlan í januar um ”tað góða samstarvið.” Fyrilestrarhaldari kemur niðri frá.

4. Fundur við foreldraumboð: Har er einki dato sett enn, men tann fundurin kundi verið í vár aftaná felagsforeldratiltakið.

5. Ferðsluátak – eftirmeting.
Tað eydnaðist væl, og fólk vóru glað fyri tað. Tað kundi sagtans verið 2 fólk báðumegin hurðarnar í staðin fyri tvey fólk við eina hurð. Hetta burdi verið eitt afturvendandi tiltak hvørt ár.
Hasar morgnarnar legði mann serliga væl merki til ferðsluruðuleikan vestarumegin. Har komu minst líka nógv børn inn tann vegin sum hinvegin.

6. Mentanantiltøk og verkætlanir:
Skúlatilboð – hví fara flokkar ikki so ofta, hoyra vit ikki um tey? Ella er tað eitt ynski frá skúlastýrinum ella hvat? Hesi tiltøk eru ofta fultbókað, men í næstu viku fara grund- og hádeildin til hvør sítt tiltak.
Hava vit eitt tiltak til evnisvikuna, sum brýtur frá tí vanliga?

7. AI/Chat GPT
Umboð frá skúlastýrinum og Hoyvíkar skúla hava verið til tiltøk um vitlíki. Til royndir skulu hesar síðurnar blokerast, so næmingarnir ikki brúka tær, tá tey eru til royn. Spurningurin er kanska, um uppgávuorðingarnar ikki skulu orðast soleiðis, at tey viðhvørt skulu finna svarið í sær sjálvum og viðhvørt skulu duga at leita eftir tí á netinum. Hetta er í øllum førum vert at hava í huga.

8. Ymiskt
- Skúlin hevur eina mannagongd, har næmingar koma inn til leiðsluna at vera, um teir órógva undirvísingina ov illa. Um hetta hendir so og so ofta verður ringt eftir foreldrunum. Og blívur hetta við, so verður okkurt meiri drastiskt gjørt.
- Jólaveitslan verður í kirkjuni, 14. des. kl. 17:00
Umframt jólaveitsluna verður frumframførsla um morgunin, har meiningin er, at ommur og abbar kunnu koma

Avtalað er, at skúlastýrið møtist aftur 1. februar 2024
Fundurin lokin kl. 18:00